

**Dimitar Ivanov Berbatov**
**Føddur:** 30. jaunar 1981
**Aldur:** 29
**Hædd:** 1.88cm
**Tjóðskapur:** Bulgaria
**Landsdystir/mál:** 77/48
**Felag:** Manchester United
Dystir/Mál fyri Manchester United: 69/27
**Fyrrverandi feløg:** CSKA Sofia, Bayern Leverkusen og Tottenham

*Dimitar Berbatov er dýrasta keypið hjá Manchester United nakrantíð. Hann kostaði góðar 300 milliónir krónur, tá Sir Alex í 2009 keypti hann frá Tottenham.*

DYSTAR FAKTA:
**Man United - Liverpool** 3-2 (1-0)
Old Trafford: 75,213
1-0 Dimitar Berbatov, 42.
2-0 Dimitar Berbatov, 59
2-1 Steven Gerrard, br, 64.
2-2 Steven Gerrard, 70.
3-2 Dimitar Berbatov, 86.

| Manchester United vs Liverpool | |
|---|---|
| Ensk meistaraheiti: | 18 – 18 |
| Champions League: | 3-5 |
| FA Cup: | 11-7 |
| Liga Cup: | 4-7 |

HATTRICK

*Berbatov skoraði øll trý málini fyri Manchester United í 3-2 sigrinum á Liverpool*

# Dimitar Berbatov í heimsflokki

**PREMIER LEAGUE** **Fólk skrála, klemmast og fegnast, sum stóð tað um lív. Tríggjar ferðir sendi metkeypið hjá Sir Alex Ferguson, Dimitar Berbatov, meginpartin av áskoðarunum á Old Trafford upp í sjeynda himmal. Meðan tað gekk hart fyri seg á vøllinum og á áskoðaraplássunum, so tóku løgreglumenninir sær av løttum uttanfyri Old Trafford í avslappaða hýrinum undan dystinum.**

Tróndur Arge
Old Trafford, Manchester

Tvær ferðir um árið hava Liverpool viðhaldsfólk møguleikan at minnast gamlar dagar, tá Liverpool var omaná móti Manchester United, men hesa fer fingu Liverpool viðhaldsfólkini einki at gleðast um, tí Dimitar Berbatov átók sær sama leiktlutin, sum Eric Cantona plagdi at hava.

### Undan dystinum

Hálvan annan tíma undan fyrsta bríkslinum eru gøturnar kring Old Trafford so smátt við at fyllast. Tað er grátt í veðrinum og hann hevur hug at regna íð so nógv. Barrir og matvøru básar eru góð støð at kroka, meðan løgreglan heldur eygað við at alt gongur sum tað skal. Tó so, har eru fleiri kúllar, sum hava keypt fleiri atgongumerki til dystin og selja tey dýrt á svarta marknaðinum.

150 pund (uml. 1350,-) fyri eitt gott Manchester United atgongumerki ella eitt atgongumerki, sum loyvir tær at sita millum Liverpool viðhaldsfólkini, bjóðar ein 35 til 40 ára gamal maður við hettutroyggju og heldur regnskjólinum langt niður yvir høvdið.

Tey bíligastu liggja um 80 pund (sum svarar til góðar 700 krónur), sigur hann víðari og vísir fram nøkur atgongumerki. Tað er ólógligt at keypa atgongurmerki uttanfyri leikvøllin undan dysti, men tað hendir meiri enn so.

**Dagsins mál:**

**Dimitar Berbatov til 2-0, tá hann saksaði bóltin í tvørstongina og inn – *í heimsflokki.***

***Sir Alex um Berba eftir dystin:***
*Í fjør fekk Dimitar Berbatov nógvan kritikk frá fjølmiðlinum, men soleiðis er tá tú keypir ein leikara fyri nógvar pengar í hesi verðini. Í ár hava hansara avrik verið góð. Hann var góður undan kappingarárinum og tað heldur fram. Tað hevur ongantíð verið nakar ivi um evnini hjá honum.*

**T-shirt uttanfyri Old Trafford:**

***»My greatest challenge was knocking Liverpool right off their fucking perch. And you can print that.«***

**Sir Alex Ferguson**

### Friðarligt hjá løgregluni

Á øllum síðugøtunum kring Old Trafford er løgreglan á varhaldi. Dystirnir millum Manchester United og Liverpool eru »High Risk« dystir, og tí er nógv løgregla úti á gøtuni. Men sunnudagin er stemningurin avslappaður í økinum rundan um Old Trafford. Í regninum standa tvey løgreglufólk á varhaldi á einum gøtuhorni. Ein ungur hugtungur maður, og ein ung væl útborin og brosandi løgreglukvinna.

Við boygdum ryggi teskar ungi løgreglumaðurin okkurt við starvsfelagan, sum klappar honum á ryggin og tykist siga við hann, at alt helst fer at laga seg. Akkurát hvat hann segði er óvist, men hann tóktist verða keddur um okkurt. Meira var ikki brúk fyri løgregluni undan dystinum.

### King Berba

Tað er bara ein kongur í Manchester United, tað er Eric Cantona, men Dimitar Berbatov hevur okkut serligt yvir sær, sum ger at hann minnir nógv um kongin. Hann hevur ein serliga útstráling, hevur altíð tamarhald á tí hann ger, hevur ein avslappaðan, men onkursvega elegantan stíl, klókur við bóltinum, hevur bóltførleika sum fáur og so hevur hann eginleikan at venda einum dysti. Málið til 2-0 eru tað næstan bara hann og Eric Cantona, sum kunnu skora uppá ein so elegantan hátt.

Tað var fult uppiborið, at Manchester United vann dystin, men tað var eisini uppiborið, at tað var Dimitar Berbatov, ið skoraði avgerandi málið. Vónirnar hjá Liverpool at vinna meistaraheitið vóru smáar í fjør, so fyri at varveita støðuna sum mest vinnandi felagið í Onglandi setti Liverpool sítt alit á at Chelsea gjørdust meistarar. Tað er sama skilið í ár!

trondur@sosialurin.fo

*Hattrickið hjá Dimitar Berbatov, er tað fyrsta hjá einum Manchester United leikara ímóti Liverpool í yvir 60 ár. Seinast ein Manchester United leikari skoraði trý mál ímóti Liverpool var í 1946. Tað var Stan Person, ið skoraði tey trý málini fyri Manchester United.*

**Man of the Match:**

**Dimitar Berbatov, skoraði hattrick og spældi ein góðan dyst í álopinum hjá Manchester United. Eisini Nani, Paul Scholes og Ryan Giggs komu væl frá uppgávuni.**